# Nógvur línu-og trolfiskur í Klaksvík

**Í dag landar Landingarmiðstøðin í Klaksvík fýra bátar, og í síðstu viku vóru fleiri skip inni, harav nøkur av línuskipunum høvdu verið á Føroyabanka**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgun liggja fýra skip við Kósabrúnna, sum Landingarmiðstøðin í Klaksvík landar. Skipini eru línubáturin, Fiskimúli, sum hevur umleið 30.000 pund á 3-4 setum, trolbáturin Gáshøvdið við 40-45.000 pundum, Fiskaklettur við 26.000-27.000 pundum og línuskipið Polarstjørnan, sum hevur eini 70.000 pund á sjey setum.

Pól Fuglø, landingarformaður, sigur, teir eisini landaðu fleiri skip í síðstu viku.

- Fríggjadagin vóru partrolararnir, Safir og Smaragd, inni. Teir høvdu eini 280.000 pund og vóru fullir undir lúkurnar. Skipini seldu beinleiðis til Kósina.

Pól sigur, at línuskipini Kvikk og Núpur landaðu eisini fríggjadagin; tey høvdu umleið 100.000 pund í part.

Hósdagin landaðu línuskipini Klakkur, Pison og Froya. Tey høvdu ávikavist 110.000, 100.000 og 70.000 pund.

Pól Fuglø sigur, at Pison, Klakkur og Froya vóru á Føroyabanka á seinasta túri, meðan flestu av hinum línuskipunum vóru norðanfyri.

– Í løtuni er streymurin harður, men nøkur av línuskipunum eru farin útaftur, og onnur gera klárt at fara. Útróðrarflotin, sum roynir við línu, liggur í løtuni, sigur landingarformaðurin.

Landingarmiðstøðin í Klaksvík landar at kalla øll skip, sum leggja veiðina upp í Klaksvík, eisini tey, sum selja beinleiðis til virkini.



*Millum skipini, sum landaðu í Klaksvík í morgun, var Fiskimúli, sum hevði umleið 30.000 pund á 3-4 setum*

Mynd: Vilmund Jacobsen

## Ågot og Jákup B í vikuni

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipini, Ågot og Jákup B, koma eisini inn at landa hesa vikuna.

Pól Fuglø á Landingarmiðstøðini í Klaksvík veit at siga, at Jákup B kemur í morgin við umleið 115.000 pundum á átta setum, og mikudagin kemur Ågot.

Á teimum fyrstu fimm setunum hevði Ågot umleið 70.000 pund, so teir gera helst eisini ein hampiligan túr hesaferð.

Sambært Pól Fuglø, er líkt til, at tað hevur vignast hampiliga væl hjá línuskipunum í seinastuni.

Góður útróður:

## 40.000 kr. í part eftir einari viku!

**Tað er vorðið sum góður útróður. Útróðrarbáturin, Barmur á Eiði, fiskaði fyri einar 230.000 krónur í síðstu viku**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Glastrevjabáturin, Barmur á Eiði, sum Sonny Kallsoy eigur, gjørdi kvettið á útróðri í síðstu viku. Teir høvdu fimm setur og fiskaðu tilsamans 27.000 pund, sum vórðu seld fyri einar 230.000 krónur.

Umborð á bátinum eru tveir mans og kona Sonna, Jenny Kallsoy, er landformaður.

Sonny sigur, at hetta er ein tann besta vikan í peningi, sum hann hevur havt á útróðri.

– Vit hava onkuntíð fingið meira fisk í eina viku, men eg haldi ikki, at vit nakrantíð áður hava selt so væl.

### Nógvur toskur

Hann sigur, at av 27.000 pundum, vóru tilsamans 19.000 pund toskur.

– Vit fingu umleið hálvt sætta túsund pund í miðal á setuna – ella 183 pund fyri hvønn stampin.

Sonny sigur, tey egna bara feska gággu á húkarnar. Frysta gággu vil hann ikki síggja, sum hann tekur til.

– Línan verður umrikin í landi, og síðan seta vit ígjøgnum trakt. Tað riggar fínt, sigur útróðrarmaðurin.

Barmur er ein bátur av slagnum, Gáski, sum upprunaliga var 28 føtur langur. Báturin er longdur, og nú er hann 37 føtur.

### Langt úti

Sonny Kallsoy sigur, at teir vóru fleiri túrar úti á Mýlingsgrunninum í síðstu viku, tá ið tað viðraði so væl, og streymurin í fyrru helvt av vikuni var so góður.

## Stórt prísfall á havtasku

**Síðan í desember mánaða er besti prísurin á havtasku lækkaður úr 47-48 krónum niður í 20-22 krónur fyri kilo**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara hýsuprísirnir, sum eru lækkaðir í seinastuni, nú so nógv hýsa hevur verið á marknaðinum. Størsta prísfallið hevur ivaleyst verið á havtasku, sum fyri jól kundi seljast fyri einar 47-48 krónur fyri kilo, tá ið hon hevði besta prísin. Í dag liggur prísurin á havtasku upp í einar 20 og 22 krónur fyri kilo, tá ið sølan eydnast væl. Annars er prísurin lægri.

Góðu havtaskuprísirnir fyri jól hava ivaleyst viðvirkað til størri roynd. Nøgdirnar á marknaðinum eru vaksnar, og sum frá líður eru prísirnir lækkaðir.

Nógva hýsan á marknaðinum hevur eisini ávirkað hýsuprísin, sum í síðstu viku fall nokso fitt.

Í morgun lá prísurin á hýsu 1 upp í einar 16-17,30 fyri kilo, men smáar nøgdir eru av hesi støddini. Prísurin á hýsu 2 lá um 10 krónur fyri kilo, meðan hýsa 3 lá upp í einar 6,90 krónur fyri kilo. Lægstu prísirnir vóru tó væl lægri.

Toskur er í løtuni ein mangulvøra, og tí hevur toskaprísurin verið góður og stabilur.

Toskur 1 og 2 liggja í løtuni upp í einar 24 krónur fyri kilo og toskur 3 upp í einar 21 krónur fyri kilo.

Lítið er á marknaðinum í løtuni av stórum toski og stórari hýsu.